# NE - DROP KOPIERNE!



suðuri í Hvalba, og yvirleggjarin fór av um tvøran. Sterki smiðurin, sum legði lærlingunum eina við, at trygdarviðurskiftini vóru í lagi, hjálmar, trygdarskógvar o.s.fr. Tí mundi tað kennast beiskt, táið hann misti eina fóring niður á tærnar á svartaskómum, og mundi gingið frá verðini, og Helgi Simonsen helt fyri við hann, at nú hevði verið gott at verið undir hjálmi.

Sjúkrahússerføðingurin Viggo Holm er ímillum teir meira kendu í landinum. Situr sum ein sáta á søguligu sykluni, sum donsku mótstøðumenninir stjólu frá týskinum undir seinra heimsbardaga. Hon er eitt perpetum mobile - eitt ævinligt gonguverk - fæst ikki at punktera heldur. Dekkini eru massiv, halda fyri øllum trýsti, og vónandi testamenterar hann hana til Fornminnissavnið, táið hann ikki orkar at traðka á pedalarnar longur. Úr ørgrynnuni av originalum nevni eg bara ein afturat. Pól Andrias í Horni. Hóast vit eru skyldmenn, hitti eg hann fyrstu ferð niðri í Silkeborg, fyri fáum árum síðani, og tað sum órógvaði meg við honum var, at áðrenn hann segði gott kvøld, boðaði hann mær frá, at hann ongantíð í lívinum ætlaði sær at velja meg. Ógvuliga kontantur. Bersøgin. Óræddur. Hvíldi í sær sjálvum. Men tað gjørdi ongan mun, fólk skula hava loyvi at tosa, hugsa, skriva og velja tað sum stendur hjarta og heila næst. Kendur fyri at vera ein paralellur til Georg Gearløs á Skála. Og gitin er søgan, táið døgverðin hjá skálafólki fór í rangastrúpan, Pól Andrias kom koyrandi við tøðvogninum undir fullari seglføring, eftir vegnum, við góðum byrði undan, og harvið prógvaði hann, hvussu menniskja kann gera sær lívið lagaligari við at nýta høvdið rætt. Og satt at siga, var eg ógvuliga ivasamur, táið heitt var á meg um at røða her í kvøld, nú bygdin kom sær upp í eina heilt aðra sferu táið ein av bygdarinnar stóru synum, Bergur í Horni, stjórin á pelagiska krematori´i Føroya, varð sligin riddari av Dannebrog, fyri trúgva tænastu hjá danska statinum. Tástaðni skilti eg, hví Pól var so bastantur hitt kvøldið á Danmarkar fløtum.

Mítt samband við bygdina byrjaði ígjøgnum stóru fjølskylduna. Onkuntíð fóru vit í stórum ferðalagi úr Syðrugøtu, og vitjaði í fleiri dagar í Uppistovu. Hjá Jóhonnu, abbasystrini. Seinri var tað skipasmiðjan, ein bráðpanna av lívi, dynamikki og framsøkn. Í skiftandi tíðum hevur dukið frá sleggjum, glæmurnar frá sveisitengrum og momentmegin frá kollosalum yvirarmum hevjað stór skip upp frá bakka-stokkunum.

Úr hesum lendi mundi kapproðurin byrja. Vit eldru minnast táið skipasmiðju-lærlingar, og aðrir úrmælingar av Skála, í áravís, vundu burtur úr øllum øðrum á føroyskum firðum, við áttamannafarinum Sølmundi og øðrum bátum hinumegin fjørðin. Neistin til eina bjarta søgu við Svani og serliga Skálabátinum. Kappróðurin hevur verið lakur hesi seinru árini, men nú tykist vend at vera komin í, og væntandi er hetta bara eitt intermezzo, at pensionistar manna 10-mannafarið. Onkur helt fyri, at bara samgongan ikki fór at taka døgverðirnar frá teimum, so tilkomnir teir eru í róðrarhøpi. Dan helt fyri, at báturin gjørdi lítlan mun, menn og musklar, vóru avgerðandi. Helst hava teir saðlað um, nú nýggir bátar skula smíðast og felagið gongur eini ljósari tíð á møti.

Sum í flestu bygdum koma hesi sveiggini fyri, ímillum ítróttagreinarnar, og nú er tað fótbólturin, sum rættiliga er farin at gera um seg. Er vorðin meginítróttin á sumri. So knáir, at nú hótta teir sjálvt siðvandu feløgini í høvuðsstaðnum. Skal eta mín gamla kepp, vovin á Uttaru Hebridunum, um Skála gerst føroyameistari og GÍ steypavinnari í hesum árinum. Tá er oyggin komin á beint aftur í hesi ítrótt, ið er farin at líkjast eini heimsreligión. Á Skála ein subreligión saman við hondbóltinum hjá strandingum á vetri.

Her grør um gangandi fót. Menningin hevur verið øgilig. Vónin vann á vónloysinum. Trúgvin á Ríkið, sum menniskja ikki erført fyri at skapa, gevur tí frælsið til at skapa tað ríkið, sum vit frá natúruni er ment til at gera nakað við, uttan at lata okkum ørkimla av tankanum um alt tað, ið vit ikki fáa gjørt nakað við. Tað finst ongin orsøk til at ofra menniskju fyri at skapa eitt ríkið, sum menniskja ikki eigur máttin til. Ongin plantar eitt pálmatræð í føroyskum urtagørðum, táið umstøðurnar ikki eru til annað enn granntrøð og runnar úr Eldlandinum. Táið Martin Luther varð spurdur hvat hann hevði gjørt, um heimsins endi varð fráboðaður at koma í morgin, svaraði hann prompte: Eg hevði planta eitt træð. Hví? Varð spurt. Eg trúgvi ikki á framtíðina, men Ríkið, sum ikki er av hesum heimi, tí ger tað mær lítlan mun, um framtíðin verður tað longri ella styttri.

Spreingiknøttarnir í London eru tagnaðir. Avleiðingarnar ræðuligar. Drápa og devulskapur. Óavmarkað konsentratión í høvdinum á øllum, táið tað hendir, men í víða spektrinum eitt blunk í stóra ljóshavinum. Lívið heldur fram. Vónin vinnur altíð á vónloysinum. Tað ræður um ikki at missa orkuna at planta træðið, líkamikið hvussu víkir og vendir. Bara soleiðis sigrar menniskja, vitið og skilið.

spískur og argandi, at stólarnir halda ikki fyri látrinum. Jóhannes Beck, ið sigst vera einasti maður í heimi, ið hevur etið eina kókaða danska pylsu við rørtong. Tórður á knallertini, ávegis í egningarskúrin, at skera jugoslavisku frillunum beitur. Tipsblaðið skrivaði einaferð, at Finn Laudrup burdi verið stikaður inni, og løntur av statinum, eittans fyri at framleiða fótbóltssnillingar, kanska skuldi kommunan givið Jústnesi sama tilboðið, táið um hondbólt ræður. Hann er annars farin at minna meira og meira um Orm Bónda, seyður og seyðakjøt eru næstan vorðin honum ein kreda í sjálvum sær. Partisanurin Regin, sum setti seg á køstin, táið kommunan ætlaði at ognartaka hann undan honum. Balletdansarin á Gjaranesi, hin føroyski Rudolf Nurejev, vælsignað at vita sær, at vit fara at fáa ein bisp, sum bara dømir seg sjálvan og ikki onnur. Ein úr rúgvuni í valaliðnum av prestum í oynni. Óli P. - ella Ole Barding - sum Aksel plagar at rópa hann. Karikaturteknari í heimsflokki. Eigur merkiligu evnini, í fáum strikum, at siga frá hvussu leikur fer í politiska talvinum, í tíðini sum kemur, onkuntíð fleiri ár frammanfyri sína tíð. Eitt listarligt geni. Tað má staðfestast, hóast eg oftani standi fyri skotum og eri farin at líkjast hinum meinaleysa og buldrasliga Baldrian, frá gomlu Barnabløðunum, alt meira, sum figururin mennir seg við tíðini. Einmansherurin Dánjal Jákup, sum fær alt at rigga, ið hann fer í holt við, og fjallið Jóhan Lervig, yvirarmarnir sum lyktapelar, kendur fyri sína óvanligu skotstyrki, tey flestu hava hoyrt um ferðina, hann skeyt hoppskotið, sum brast í tvørstongina

